LÖGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

Tórshavn, 1. apríl 2008
123-048/08

Løgtingið
Landsstýrismálanevndin
Postboks 208
110 Tórshavn

Víst verður til skriv frá Landsstýrismálanevndini dagfest 27. mars 2008, har heitt verður á løgmann um at upplýsa nevndini um arbeiðssetningin og niðurstøðuna hjá nevndini, sum kannar málið viðvíkjandi "viðurskiftunum millum landsstýrismannin í fiskivinnumálum og Kongshavnar Útgerðarfelag og disposisjónir í felagnum".

Løgmaður hevur ikki sett ávísa nevnd at kanna málið. Hann bað fýra fólk - tvey embætisfólk og tveir uttanhýsis serfrøðingar í ávikavist løgfrøði og grannskoðan - um at gjøgnumganga málið viðvíkjandi Tórbirni Jacobsen, landsstýrismanni í sambandi við Kongshavnar Útgerðarfelag.

Endamálið við gjøgnumgongdini var at finna út av, um sannlíkindi eru fyri, at Tórbjørn Jacobsen tilvitað hevur selt sær sjálvum partabrøv í p/f Atlanskolvetni til undirprís, umframt hvørt tað er forsvarligt, at persónur, ið eigur part í felagi, ið skyldar landinum munandi upphæddir, situr í embæti sum landsstýrismaður.

Arbeiðið er liðugt, og upprit um málið er hjálagt.

Vinalig heilsan

Jóannes Eidesgaard
løgmaður

- 3. APR. 2008

Løgtingið j. nr. 713.20080004 3

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroes

Tel: +298 351010 · Fax: +298 351015 · e-mail: info@tinganes.fo · www.tinganes.fo